# Toyota Motor Corporation 70 ár



*Í 1936 byrjaði framleiðslan av bilum við modell AA*



*Toyota Corona frá 1964. Toyota komu á føroyska marknaðin í 1963*

**Tann 28. august vóru 70 ár liðin síðan Toyota Motor Company í Japan varð stovnað tann 28. august 1937. Hetta var góð tvey ár eftir at fyrsta prototypan, modell A1, var gjørd í 1935**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Toyota, sum í dag er heimsins størst bilaframleiðari, byrjaði fyri umleið 100 árum síðan sum ein verksmiðja, ið framleiddi vevar til klædnaídnaðin. Stovnarin av Toyota Motor Company var Kiichiro Toyoda, sum saman við pápanum Sakichi Toyoda hevði rikið fyritøkuna Toyoda Spinning & Weawing Ltd., sum m.a. framleiddi Toyoda G-type vevar, sum teir høvdu patent upp á.

Í 1936 byrjaði framleiðslan av bilum við modell AA. Sama árið skifti verksmiðjan eisini navn frá Toyoda til Toyota. Fyritøkan eitur í dag Toyota Motor Corporation og kann hátíðarhalda 70 ára føðingardagin sum heimsins størsti bilaframleiðari.



*Stovnarin av Toyota bilmerksmiðjuni Kiichiro Toyoda 1894-1952*

Føroya Ellisafør:

# Motorsúkklur til Trøllanesar



TÍÐINDASKRIV

Leygardagin 1. september skipar áhugafelagið Føroya Ellisafør fyri afturvendandi tiltakinum "MC-Boogie", ið hesaferð er ein túrur til Trøllanesar har borðreitt verður við Kaffi, Te og heitt kakao saman við vaflum og bollum.

Luttakararnir møtast í felagshølinum yviri við Strond 22 leygardagin kl. 11. Koyrt verður kl. 12.00 stundisliga til Shell-støðina við Streymin. Umleið kl. 13.15 verður farið víðari til Klaksvíkar, tó við einum stuttum steðgi við rundkoyringina við Skálafjørðin. Kl. 14.15 verður farið við "Sam" yvir á Kalsoynna, og koyrt verður til Trølanesar.

Kl. 17.35 verður farið verður yvir um aftur til Klaksvíkar. Veitsla verður um kvøldið. Nærri um hetta leygardagin.

## Honda Civic til sølu



Honda Civic 1,4 hatchback, árg. 1999, km. 99.000

Bilurin er væl hildin og í góðum standi.

**Prísuppskot kr. 59.000.**

**Tel. 517696**

## Suzuki Liana til sølu



Suzuki Liana 1,6 S, árg. 2006 Km. 30.000
4 píkadekk við alufelgum fylgja við

**Prísur: Kr. 149.000,-**

**Áhugað kunnu ringja á tel. 235910**